# Kim´s - når du er sulten for show!

**Við Kim Hansen á odda, hitaði Eurovision Hit Band upp, áðrenn brøðurnir fóru á pall leygarkvøldið. Kim og Co. spældu øll tey kendu løgini og settu eitt punktum saman við Olsen beiggjunum, so tað brakaði**



*Hóast Olsen brøðurnir vóru stóra navnið, so var ikki sørt, at fólk væntaðu nakað av nýstovnaða Eurovision Hit Band, ið er ein samanrenning av góðum kreftum innan føroyskt tónleikalív. Yngri sum meira royndar kreftir*

UMRØÐA
*Dagfinn Olsen*

Tað var Pætur við Keldu, sum setti hol á konsertina leygarkvøldið, har brøðurnir Olsen stóðu ovast á breddanum.

Pætur spældi løg av fløguni, hann gav út fyri tíð síðani, umframt so ymiskt sum Elton John og Chaplin (sum jú eisini var frálíkur tónasmiður).

Eftir at Pætur við Keldu hevð havt eina stilla og flotta framførslu í Ítróttarhøllini á Hálsi leygarkvøldið, stóð Eurovision Hit Band á skránni. Hóast Olsen brøðurnir vóru stóra navnið, so var ikki sørt, at fólk væntaðu nakað av nýstovnaða Eurovision Hit Band, ið er ein samanrenning av góðum kreftum innan føroyskt tónleikalív. Yngri sum meira royndar kreftir.

Júst sum við fjøldini í høllini hetta kvøld. Har vóru tey, sum vóru um 20 ára aldur, har vóru børn, men tey flestu vóru farin um tríati, nógv um fimmti og seksti og onkur helst eisini um tey sjeyti.

### Hitt omaná hitt

Tað var eingin løtt uppgáva, at leika hetta kvøld. Talan var um eina sonevnda sitikonsert. Stólar vóru til fjøldina at sita á. Og hóast ikki var talan um eina pínliga »avslappaða« fjøld, so er huglagið eitt annað við stólum, enn uttan. Talan er meira um eitt hugnakvøld. Og tað var eisini hugnaligt leygarkvøldið!

Hjá teimum á pallinum, er tað kanska heldur tyngri at fáa eina sitandi fjøld uppfrá, enn eina standandi. Men aftaná hesar hugleiðingar um sitandi og standandi áhoyrarar skal sigast, at hetta ikki var nakað kardinalpunkt leygarkvøldið. Til tess eru limirnir í Eurovision Hit Band ov garvaðir.

Byrjanin var Let Me Be The One. Kanska ein heldur spøk byrjan, hóast sangurin er sum gjørdur at byrja við, við tað, at hann byrjar beint á slagið.

Men ljóðstyrkin var ikki høg, so neyvan kundi fult trýst fáast á. Eisini var Hit Bandið fyri tí vanlagnu, at hava nógv ýl í mikrofonum. Men helst er trupult at ljóðblanda so stóran bólk, ið hevur bæði kór og blásarar.

Men brátt kom hitin í upphitingarbólkin. Og so gekk sum eftir ánni. Eitt tyssi av kendum prixløgum. Sigast skal, at rómin av føroyskum tónleiki her prógvaði sítt virði, saman við einum av nýggjaru stjørnuskotunum, Arnfríð Lutzen, ið sang framúr, við vakrari, reinari rødd. Ein Bischen Frieden og Waterloo kunnu nevnast. Og ikki at gloyma Live Shine A Light. Eisini kór (Laila Carlsen og Margreta á Rógvu Joensen) sungu væl, eins og blásararnir stóðu seg avbera væl.

Fjøldin hevði fingið hitan, tá finalan kom. Pætur við Keldu kom við á pallin og Laila kom longur fram á pall. Saman settu tey, saman við Kim, hol á sangin Hallelujah. Flott! Sera flott!!

Sjálvsagt mátti verturin Tróndur Djurhuus, ið annars stóð seg væl og skemtiliga, biða hesi fólkini koma aftur á pallin. Og tað var gott, tí tey tóku byrjanarlagið, Let Me Be The One, umaftur. Og tað gekk munandi lættari hesaferð, nú heitir fingrar handfóru streingir og tangentar og nervar ikki longur spældu inn (ella við).

### Eitt brak

Eurovision Hit Band var ein staðfesting av góðu framførsluni, sum mong ivaleyst høvdu roknað við. (Fjøldin er jú eirindaleys).

Olsen Brøðurnir spældi síðani.

Men finalan var við Olsen beiggjunum og Eurovison Hit Band í felag. Nokkso ófyrireikað. Men kenda lagið I Saw Her Standing There hjá Beatles, kenna tónleikarar. Og hetta gjørdist eitt brak, har dugnaligu føroysku tónleikararnir løgdu ein so væl swingandi botn í, at Jørgen og Noller mistu takið, sungu við lív og sál og sjónliga ongan hug høvdu at gevast. Tað »swingaði og rockaði«, sum ein norskur prix sangur einaferð segði. Eitt flott punktum, har ein hungraði eftir meir.

Ein lýsing fyri fronsk epli segði einaferð, at tey skuldu etast, »Når du er sulten for sjov«.

Her siga vit: Kim´s - når du er sulten for show!



*Rómin av føroyskum tónleiki her prógvaði sítt virði, saman við einum av nýggjaru stjørnuskotunum, Arnfríð Lutzen, ið sang framúr, við vakrari, reinari rødd*

## Óføroysk innrás má steðgast

**Jenis av Rana heldur, at føroyskt mentanarlív er fyri stórari niðurgongd, nú rúsdrekkalógin skal broytast og útlendskir stripparar floyma inn til landið. Hann mælir til at steðga ólevnaðinum**

FALL
*Eyðun Klakstein*

Jenis av Rana heldur, at landsstýrið skal taka stig til at steðga ólevnaðinum, sum hann heldur breiðir seg í føroyska samfelagnum.

Hann nevndi ólavsøkuna sum eitt dømi um, hvussu føroyska mentanin stillisliga verður troðka burtur.

– Við eitt er mentan føroyinga ikki nóg góð, kvinnur verða innfluttar av flatlondum at dansa striptease, erotiskur dansur mátti á skránna – á sjálvari tjóðarhátíðini røkk føroyska mentanin ikki, vísti Jenis av Rana á í viðgerðini av løgmansrøðuni í løgtinginum fríggjadagin.

Hann helt eisini, at tað er skeivt at lata útlendingar gera av, hvussu føroyska rúsdrekkalógin skal verða.

– Oljuráðstevna skuldi vera í Runavík, og alt á gosi, tí knappliga vórðu Føroyar og serføroyska mentanin ikki nóg góð. Mentanin var ikki nóg góð til teir útlendingarnir, ið higar komu, tí hesir sloppu ikki at keypa sær ein sterkan afturvið matinum, segði Jenis av Rana.

Hann spurdi landsstýrið, um tað ætlar at lata slíkan ólevnað troðka seg inn á føroyska samfelagið, ella um landsstýrið fer at taka stig til at steða hesum.



Fráfarni formaðurin í Fiskidaganevndini:

# Politikarar mangla dirvið



*– Ein minking í fiskidagatalinum fer at merkja minni veiði fyrstu tíðina, men í longdini fer tað at merkja, at meira kann fáast við minni orku, og lønsemið í vinnuni fer at vaksa, heldur Atli Gregersen*

**Politikararnir tora ikki at skerja fiskidagatalið, tí tað er pínufull broyting at gera, sigur Alti Gregersen, sum er farin frá sum formaður í Fiskidagaskipanini**

FISKISKAPUR
*Eyðun Klakstein*

Leygardagin fór Atli Gregersen frá sum formaður í Fiskidaganevndini, sum er sett at ráðgeva Fiskimálastýrinum.

– Fiskimálastýrið tekur ikki atlit til fiskifrøðina, tá fiskidagatalið verður ásett, og tí havi eg ikki hug at halda fram í nevndini, sigur hann.

– Tað er alneyðugt, at veiðitrýstið verður skert varisliga komandi árini, tí á tann hátt kunnu vit halda fast við framgongdina í vinnuni, og vit kunnu skapa ein enn meira burðardygga vinnu, sigur Atli Gregersen.

Hann mælti til ein niðurskurð upp á seks prosent í fiskidagatalinum fyri komandi árið, meðan hinir fýra limirnir í Fiskidaganevndini mæltu til sama fiskidagatal. Fiskifrøðingarnar hildu, at best er við eini minking upp á 25%.

Men landsstýrismaðurin við fiskimálum mælir til, at fiskidagatalið verður tað sama komandi ár, og tað fer hann at fáa undirtøku fyri í tinginum.

### Tora ikki

Atli Gregersen heldur, at politikarar mangla dirvið til at skerja veiðistrýstið.

– Teir tora ikki at minka talið á fiskidøgum, tí tað er ein pínufull broyting at gera í fyrstu atløgu. Ein minking fer at merkja, at onkur skip mugu leggjast, og onkur reiðarí ikki fara at klára seg. Men hetta er eitt neyðugt stig at taka og verður í longdini ein stórur fyrimunur fyri vinnuna, sigur hann.

– Ein minking í fiskidagatalinum fer at merkja minni veiði fyrstu tíðina, men í longdini fer tað at merkja, at meira kann fáast við minni orku, og lønsemið í vinnuni fer at vaksa.

Atli Gregersen heldur, at tað verða ikki færri fiskimenn fyri tað, um fiskidagatalið minkar. Hinvegin heldur hann, at fiskimenn fara at fáa nógv betri umstøður at arbeiða undir.

– Hevði sama reiðarí átt allar fiskidagarnar undir Føroyum, so hevði hetta reiðarí lagt ein triðing av skipunum. Men trupulleikin við at skerja fiskidagatalið nú er, at tað eru so nógv reiðarí og skip, og at onkur mugu leggjast, um tað verða færri fiskidagar. Tað er hetta, sum politikarar mangla dirvið til at gjøgnumføra.

### Jørgen sannførdur

Atli Gregersen heldur, at politikararnir mugu lurta betri eftir tí, sum fiskifrøðingarnir bera fram.

– Fiskivinnan er okkara høvuðsvinna og hevur alstóran týdning fyri samfelagið. Tí mugu vit lurta eftir fiskifrøðini eisini. Tað er óhugaligt at síggja, hvussu ivi verður sáddur um alt, sum fiskifrøðingarnir siga, tá tað merkir niðurskurður í fiskidøgum og trýsti, sigur hann.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, heldur ikki, at politikararnir mangla dirvið til at skerja fiskidagatalið.

– Vit hava gjørt okkara tilmæli eftir bestu sannføring. Vit hava tikið øll tilmælini við í okkara meting, og so hava vit gjørt eina niðurstøðu, sum vit halda tænir samfelagnum best, sigur Jørgen Niclasen.

– Vinnan er sjálv í ferð við at tillaga seg, og tí er eingin orsøk at sjokkviðgera hana nú, heldur hann.

## Bilar stoyttu saman í tunnli

**Illgruni er um, at rúsdrekka var uppi í, tá ein bilurin fór yvir í skeiva koyribreyt í Kollfjarðatunnlinum leygarkvøldið**

ÓHAPP
*Eyðun Klakstein*

Leygarkvøldið um midnáttarleitið hendi eitt ferðsluóhapp í Kollfjarðatunnlinum.

Ein bilur, sum kom koyrandi suðureftir, fór yvir í skeivu koyribreytina, og har rendi hann frontalt inn í ein bil, sum var á veg norðureftir.

Bilarnir báðir fingu stóran skaða av ógvusliga samanstoytinum, men eingin álvarsligur fólkaskaða hendi. Eitt av ferðafólkunum í øðrum bilunum fekk ein minni snudd.

Løgreglan í Havn sigur seg hava illgruna um, at førarin á bilinum, sum endaði á skeivari síðu av vegnum, var ávirkaður av rúsdrekka.

# Landsstýrið er útbrent

**Formaðurin í Miðflokkinum heldur, at eitt nýtt og betri arbeiðsført landsstýrið skal sleppa at stýra**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

– Eftir at hava lisið løgmansrøðuna nágreiniliga kann eg bert staðfesta, at landstýrið er steðga upp. Nú er einki meira natúrligt enn, at eitt nýtt og betri arbeiðsført landsstýrið sleppur at taka við.

Tað segði Jenis av Rana, tá viðgerðin av løgmansrøðuni var í tinginum fríggjadagin.

Hann heldur, at nógv talar fyri, at eitt løgtingsval hevði verið best beinanvegin, tí landsstýrið hevur sett seg í bíðistøðu eftir olju, úrsliti av samráðingum við danir og eftir aðalorðaskiftum í tinginum.

Jenis av Rana heldur, at einki fer at koma burtur úr seinastu átta til nýggju mánaðarnar, sum eru eftir av hesum valskeiðnum, og tí er líka so frætt, at val verður útskrivað sum skjótast, so nýtt landsstýrið kann taka við.

## Bilur stolin í Vestmanna

Sunnudagin gjørdust fólk í Vestmanna varug við, at ein bilurin var burturblivin í Vestmanna.

Stuldurin varð fráboðaður løgregluni sunnumorgunin, og seinna partin sunnudagin kom bilurin afturíaftur.

Hann varð funnin aftur í Dalatúni í Havn.

ek